## VIÐMERKINGAR

# Hevur nakar einkarrætt upp á svartkjaftin?

JAN HALDANSEN

Nú skriva vit 2006, og kvotering er komin upp á svartkaftin. Føroyingar hava fingið tillutað góð 500.000 tons av samlaðu heildarkvotuni, men hvat skulu vit gera við hesi góðu tons.

Eg bleiv eitt sindur ørkymlaður, tá eg hoyrdi Atla Hansen svara útvarpsmanninum aftur, tá ið hann spurdi um tað var grundarlag fyri fleiri skipum at fiska svartkjaft. Svarið hjá Atla var, at tað helt hann ikki.

Er tað veruliga blivið so galið, at kraftblokkabátanir skulu hava einkarætt upp á svartkjaftin, sum føroyingum er tillutað?

Seinni í innslagnum bleiv sagt, at Atlantic Navigator tørvaði einans 10.000 tons av surimi = 35.000 tons av svartkjafti fyri at bera seg? Tað vil siga, at kraftblokkaskipini kunnu fiska restina, tó skulu nøkur tons brúkast til at keypa kvotur til onnur skip.

Hvat gera teir við svartkjaftin? Jú tað blívur malið til mjøl á landi og síðani selt av landinum fyri tað mesta og eisini framleitt til alifóður.

Hvørji virði skapar hetta? Jú manninganar tjena nógv, og Havsbrún tjenar pengar.

Hvussu hevði tað sæð út, um vit høvdu eini 5 skip sum Atlantic Navigator ella sama model og hesi skip frystu inn ella virka surimi umborð. Jú, tú hevði fingið eini 600-700 meiri arbeiðspláss á sjónum, vøran hevði blivið løgd upp til frystigoymslunar í Føroyum ella blivið umskipað her um kaikant, samstundis sum hon hevði blivið seld fyri eitt nógv størri virði enn nú.

Samfelagsbúskaparliga so hevði hetta verið ein nógv betur loysn fyri Føroyar, og vit høvdu samstundis eksporterað eina kvalitetsvøru burturúr svartkjaftinum.

Nú er tað blivið soleiðis í dag, at fiskirættindi á landgrunninum er blivin ogn hjá nøkrum einstaklingum á landi. Skal svartkjafturin eisini blíva ogn hjá nøkrum ríkmonnum á landi, so at eingin ungur maður, sum hevur eina ætlan og áræði at fara í gongd við nýtt virksemi og skapa eitt størri virði av fiskinum, skal blíva steðgaður, orsakað av at einkarættur er blivin á økinum.

Nei, nú mugu politikarar taka í egnan barm og geva monnum loyvi til at skapa virksemi, sum kann geva eitt nógv munabetur avkast til bæði land og fólk.

Kraftblokkaskipini hava nok at fiska av, tað kemur ikki fyri, at teir ikki eru ovastir á intøkulistanum hjá Fiskimannafelagnum.

Eg vil mæla til, at øll skipanin verður endurskoðað og at eisini øll skipanin við fjarfiskiflotanum verður endurskoðað og tillagað broyttu fortreytunm av virka undir.

Bøtið um skaðan nú, um eitt ár kann skaðin ikki reparerast.

# Frank og bandupptakarin

KAJ LEO JOHANNESEN
Sambandsflokkurin



**Tá samráðingar eru millum tveir partar, so er útgangsstøðið sjálvandi, at partarnir vísa virðing fyri hvørjum øðrum, og málið er at finna eina felags niðurstøðu. Men eftir at hava lisið samrøðuna sum Sosialurin hevði við Frank Jensen millum jóla og nýggjárs, og viðmerkingarnar frá fyrrverandi skrivaranum í landstýrinum, so kundi verði áhugavert at fingið »tendrað ljósini« í hølunum, har nevndu samráðingar fóru fram**

Frank Jensen sigur í samrøðu við Sosialin millum jóla og nýggjárs, at á einum fundi í Tinganes á heysti í 2000, millum hann og Høgna Hoydal, hevði eitt av føroysku embætisfólkunum fjalt ein bandupptakara undir borðinum.

At fjala ein bandupptakara undir borðinum undir samráðingum má sigast at vera sera grovt brot á allar vanligar mannagongdir.

Fyrrverandi skrivarin í landsstýrinum, Sjúrður Skaale, svarar í blaðgrein í gjár, at tað var hann sum hevði bandupptakaran undir hond, men at hesin var ikki "undir" borðinum, men "á" borðinum.

**Á ella undir ?**

Um nevndi bandupptakarin stóð á borðinum ella var fjaldur undir borðinum, er ikki lætt hjá okkum, sum ikki vóru hjástødd, at meta um. Men tað tykist løgi, at upptøkumaðurin sigur seg hava skift band tríggjar ferðir, meðan mótparturin sigur seg ikki hava varnast, at nakað varð fest á band. Ein fer at ivast í, um fundurin møguliga varð hildin í myrkri?

Ein annar spurningur, sum kundi verið áhugaverdur at fingið svaraðan, er, um tað var vanligt undir fullveldissamráðingunum at samráðingarfundirnir vórðu festir á band? Var hetta ein mannagongd, sum báðir partar vóru samdir um, ella hevði hesin eini fundurin í Tinganesi serliga stóran týdning (størri enn til dømis samráðingarfundirnir, sum vórðu hildnir í Keypmannahavn)?

Hví hevur Frank Jensen aftur og aftur spurt Sjúrð Skaale, um hann hevur "slettet båndene fra Tinganes-mødet", og ikki um hann hevur beint fyri øðrum bondum frá sama tíðarskeiði?

Frank Jensen sigur í samrøðuni við Sosialin, at avtalað var frammanundan fundinum, at eingin bandupptakari skuldi nýtast. Sjúrður Skaale sigur haraftur-urímóti, at einki var avtalað um, hetta.

**Hvat var endamálið?**

Tað er vanligt at gera fundarfrásagnir, uttan at bandupptakari verður nýttur sum hjálpiamboð. Um endamálið við fundarfrásøgnini var tað vanliga (at greiða frá hvat gekk fyri seg á fundinum, hvør var til staðar, nær og hvar fundurin varð hildin og hvørjar niðurstøður vórðu gjørdar), so er bandupptakari óneyðugur. Spurningurin er tí, hvat bondini skuldu brúkast til ?

Tá sjálvur fundarskrivarin nú sigur í bløðunum, at eingin politikari hevur sagt sannleikan um tað sum gekk fyri seg á fundinum, so kundi tað verið eitt hugskot, at Føroya fólk fekk at vita, hvat kom at standa í fundarfrásøgnini, sum er skrivað út frá bandupptøkunum.

**Ymiskar útmeldingar**

Fundurin í Tinganesi var ikki tann einasti, sum var millum Frank Jensen og Høgna Hoydal í sambandi við fullveldisætlanina. Í september 2001 (eftir at samráðingarnar millum landsstýrið og stjórnina vóru slitnaðar) var fundur í Keypmannahavn um yvirtøku av rættarskipanini og løgregluni. Aftaná tann fundin sendi Høgni Hoydal eitt tíðindaskriv út, har hann segði, at nógv bendi á, at fundurin var eitt gjøgnumbrot. Men Frank Jensen helt ikki, at fundurin var nakað gjøgnumbrot, og Anfinn Kallsberg segði, at báðir høvdu rætt – bara uppá hvør sín máta.

**Eingin felags niðurstøða**

Eitt sum eyðkendi fullveldissamráðingarnar var, at partarnir høvdu ilt við at finna nakra felags niðurstøðu. Men tá tað nú vísir seg, at partarnir heldur ikki kunnu kom ásamt um, hvørt ein bandupptakari stóð "á" borðinum ella "undir" borðinum, so skilja vit betur, hví semja ikki kundi fáast um onnur meira týðandi mál.

**Ráddi tilvildin?**

Áhugaverdi spurningurin nú er, um allar avtalur eru hildnar um at bondini skuldu slettast eftir fundin? Hvat meinar Sjúrður Skaale við, tá hann sigur, at onkrar nýggjar upplýsingar um fundin eru á veg, og at hesar stava frá nøkrum burturtveittum bondum, sum onkur skal hava funnið. Fyrrverandi skrivarin sigur at "tað hevði verið stuttligt, um tað passaði..."

# Løgmaður vanvirðir Løgtingið

BILL JUSTINUSSEN
Løgtingsmaður fyri Miðflokkin



Sum løgtingsmaður harmist eg um, at Føroyar hava ein løgmann, sum traðkar oman á hægsta valdi í Føroyum, bara tí at 21 tingfólk hava valt hann til løgmann. Fremsta og fínasta uppgáva løgmans er at seta í gildi tær lógir, sum Føroya Løgting samtykkir. Løgmaður er amboð Løgtingsins at útinna tað vald, sum náttúrliga liggur hjá Løgtinginum. Hesum roynir løgmaður at venda á høvdið, so løgmaður sjálvur gerst løggevari og Løgtingið eitt avgreiðslustað. Hetta má steðgast.

**Íslandssáttmálin**

Fyri eini tíð síðani legði løgmaður fyri tingið Hoyvíkssáttmálan eisini nevndur Íslandssáttmálan. Hóast løgmaður undir 1. viðgerð staðiliga varð ávaraður um avleiðingarnar av at flyta løggávuvald frá Løgtinginum til landsstýrið, lætst hann ikki um vón. Talan var um pragmatiskar loysnir, og tí máttu grundleggjandi fólkaræðislig virðir víkja. Løgmaður ætlaði at avmarka vald Løgtingsins ímóti viljanum hjá fleiri løgtingslimum – eisini samgongutinglimum. Tíbetur sær út til, at løgmaður ikki sleppur at fremja sín egna vilja í hesum máli.

**Skattur**

Nakrar dagar fyri jól lumpaði landsstýrið eitt lógaruppskot ígjøgnum Løgtingið. Málið snúði seg um, at landsstýrismaður framhaldandi skal hava heimild til at áleggja barsilsgjald, sum er ein skattur. Í fyrsta umfari afturvísti formansskapur Løgtingsins lógaruppskotinum, men so broytti landsstýrismaðurin bara uppskotið, so tað kundi verða framlagt, fyri síðani at fáa vinnunevndina at broyta tað, so tað líktist upprunaliga uppskotinum, sum formansskapurin ikki vildi loyva at verða framlagt. Hendan misnýtsla av skipanini er vanvirðing av Løgtinginum, stýrisskipanini og formansskapinum av ringasta slag. Óheiðurligt og til lítlan sóma fyri okkara løgmann, sum eisini í hesum máli gekk á odda fyri at avmarka vald Løgtingsins og geva landsstýrinum meiri vald.

**Verkafólk, fiskimenn og samkynd**

Og so mátti løgmaður enn einaferð profilera seg sum tann tolsama landsfaðirin, sum vil øllum væl. Og tí var tað so sera umráðandi hjá honum at nevna tey samkyndu í nýggjársrøðuni. Hvønn umboðar hann?? Ikki landsstýrið, tí har er ikki semja um hesa orðing. Ikki Javnaðarflokkin, tí har er ikki semja um slíka orðing. Ikki Løgtingið, tí Løgtingið hevur við stórum bókstavum sagt sína meining um støðu teirra samkyndu í samfelagnum. Løgtingið var við greiðum meiriluta samt um, at hesin bólkur er ikki fyri mismuni, og tí var ikki neyðugt at geva teimum serliga verju við lóg. Og allíkavæl gongur løgmaður í nýggjársrøðuni beint ímóti hesi støðu. Tað gjørdi hann eisini, tá hann fyri útlendskum fjølmiðlum harmaðist støðu Løgtingsins. TAÐ SKAL EIN LØGMAÐUR ALDRI GERA. Tað er ongantíð uppgáva løgmans at harmast tær viðtøkur, sum Løgtingið ger. Hann er trygdin hjá Løgtinginum fyri, at tær viðtøkur, vit gera, verða settar í verk. Tí misrøkir Jóannes Eidesgaard sítt starv sum løgmaður, tá hann í heilum foldar seg út um sína privatu áskoðan um bæði eitt og annað. Løgmansstarvið er almennasta starvið, sum til er í Føroyum, og tí má løgmaður seta til síðis sína egnu hugsan, so leingi, hann er løgmaður. Sum løgmaður er hann á ein hátt andlit Føroya Løgtings úteftir. Hansara aðaluppgáva er at staðfesta Løgtingsins vilja. Tí fari eg sum løgtingsmaður at mótmæla atburði løgmans og heita á hann um at broyta atburð, nú vit eru byrjað eitt nýtt ár.

W W . S O S I A L U R I N